# Ferðsluskaðanevndin ger mun

**Í Danmark var ein Havarikommission for vejtrafikulykker sett í 2001. Hendan nevndin hevur í hesum tíðarskeiðnum arbeitt við evnum innan ferðslu í Danmark og staðfest nakrar trupulleikar, sum tað so verður arbeitt við at bøta um**

FERÐSLA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Formaðurin í donsku ferðsluskaðanevndini Sven Krarup Nielsen sigur, at danska ferðsluskaðanevndin fyrst og fremst hevur til endamáls at kanna vanlukkur og koma við staðfestingum og metingum um, hvat kann gerast fyri at lækka um talið á vanlukkum, har annaðhvørt fólk lata lív ella koma álvarsliga til skaða.

Tí kann sigast, at hon í prinsippinum er tað sama, sum leiðarin á Ferðslutrygd í Føroyum tosar um. Havarínevndin í Danmark sá dagsins ljós eftir, at fólkatingið hevði samtykt, at talið á vanlukkum, sum krevja mannalív ella álvarsliga skaða fólk, skal lækka við 40 % yvir eitt áramál upp á tólv ár. Frá 2001 til 2012.

– Vit halda so nøkulunda málið, sigur formaðurin í nevndini og vísir á, at talið lækkar miðvíst í Danmark.

### Evni verða lýst

Nevndin hevur arbeitt við tveimum evnum hesa tíðina, síðani hon kom fram. Og tey eru í ferð við tað triðja evnið nú.

Fyrsta evnið var einavanlukkur millum ung undir 25 ár. Har tað varð staðfest, at serliga ungir menn undir 25 ár nýta vegirnar til teirra spælipláss. Og her sigur Sven Krarup Nielsen, at tað er umráðandi at finna útav, hvat skal gerast fyri at broyta hugburðin hjá ungum.

– Nevndin staðfesti hendan trupulleikan og vísir á, at tað er tørvur á at gera nakað við trupulleikan her og nú. Vit koma við einum boði uppá, at her er ein trupulleiki, og so verður arbeitt út frá tí, greiðir Sven Krarup Nielsen frá.

Hann sigur eisini, at í fleiri kommunum niðri eru fleiri royndir gjørdar at taka tey ungu við upp á ráð hesum viðvíkjandi. Roynt verður at fáa tey sjálvi at siga, hvat tey vilja hava. Sjálvi at orða eitt hugskot til verkætlanir fyri at fáa tey at lata vera við at nýta vegirnar til spælipláss.

Og hetta hevur givið úrslit, sambært formanninum í donsku ferðsluskaðanevndini.

Tað næsta evnið, sum tey hava arbeitt við, eru ferðsluvanlukkur á motorvegunum.

Og tað, tey nú eru í holt við, er ferðsluvanlukkur, har vørubilar eru við.

Evnini, sum nevndin arbeiðir við, verða vald av ferðslumálaráðnum, og nevndin savnar upplýsningar inn frá millum 30 og 40 vanlukkum á vegunum í Danmark og útfrá teimum verður ein frágreiðing gjørd og almannakunngjørd.



*Danska ferðsluskaðanevndin sá dagsins ljós í 2001, tá fólkatingið hevði samtykt, at talið á álvarsligum ferðsluvanlukkum í tíðarskeiðinum 2001 til 2012 skal lækka við 40 %*



*Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, er sannførdur um, at ein ferðsluskaðanevnd hevði gjørt stóran mun í arbeiðinum við at kanna ferðsluvanlukkur*

*Savnsmynd*

## Jón Kragesteen:

# Vit mugu koma leysasøgunum til lívs

**Enn ein ferðsluvanlukka hevur kravt eitt mannalív. Enn eitt kjak er komið upp, og fólk eru ójøvn á máli um, hvørs tað er rætt at gera so nógv burturúr. Leysasøgur koma fram og mangt annað. Alt hetta, heldur leiðarin, kann sleppast undan, um ein ferðsluskaðanevnd fer inn og kannar eina vanlukku og kemur við einari niðurstøðu**

FERÐSLA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd hevur longi tosað um at fáa eina ferðsluskaðanevnd setta í Føroyum, sum fær til uppgávu at kanna ferðsluvanlukkur, staðfesta ábyrgd og hvat er hent. Og ikki minst at arbeiða víðari við teimum upplýsningum fyri at gerast klókari og síðani at koma við tilmælum til, hvat kann gerast fyri at minka um vanlukkuvandan.

Hetta verður alt meiri vanligt í grannalondum okkara. Í Danmark kom Havarikommissionen for vejtrafikulykker í 2001, og arbeiðir hendan nevndin stútt við at kanna ferðsluvanlukkutema á vegunum í Danmark.

Ein tílík nevnd hevði kunnað gjørt eitt stórt arbeiði fyri at minka um vandarnar við vanlukkum á føroysku vegunum, er leiðarin á Ferðslutrygd sannførdur um.

### Staðfesting

Í kjalarvørrinum av hvørjari ferðsluvanlukku, sum annaðhvørt krevur mannalív ella ger, at fólk koma álvarsliga til skaða, kemur eitt kjak fram, sum tíverri ofta vísir seg bert at vera eitt upplop í nakrar dagar. Í øllum slíkum koma eisini nógvar leysasøgur, og tað er helst tí, at landið er so lítið, at tosið fer skjótt runt. Hvussu er og ikki, hvør tann einasta vanlukka skapar kjak av ymsum slagi. Og nógv av hesum kjakinum gongur fyri seg í fjølmiðlunum.

Kanningar verða gjørdar av vanlukkunum fyri at staðfesta orsøk og annað. Men hóast tað, so eru tað altíð nógvar gitingar, sum uttan iva hava við sær, at nógvar leysasøgur fara at ganga.

Ferðsluskaðanevndin hevði kunnað avlívað nógvar av leysasøgunum, sum ofta fara runt eftir vanlukkur.

– Nevndin fer inn og sigur, hvat hendi. Stutt sagt kann sigast, at hon leggur seg ikki eftir at staðfesta skuld ella nakað tílíkt. Hon kannar vanlukkuna og kemur við eini frágreiðingum, hvat fór fram, og hvat kann gerast fyri at sleppast kann undan eini vanlukku aftur, greiðir Jón frá.

### Evni

Tað ber ikki so væl til at arbeiða við ávísum evnum inna ferðsluvanlukkur í Føroyum, tí talið á vanlukkum - um enn tað samanborið við onnur lond er høgt í forhold til fólkatalið - er lágt. Men Jón heldur, at um til dømis tíggju tær mest álvarsomu vanlukkurnar seinastu sjey árini til dømis verða kannaðar, so hevði tað kunnað borið til at funnið eitt evni ella fleiri innanfyri tær, sum kundu verðið lýst í einari frágreiðing ella fleiri frá nevndini.

Tað finnast heldur ikki nóg nógv hagtøl um ferðsluvanlukkur til at gera kanningar, heldur hann.

Hann tekur eina vanlukku fram, sum hendi fyri nøkrum árum síðani, har autoverjan var vandamikil á staðnum. Eftir hesa vanlukkuna varð gjørt av, at autoverjur skulu líka nøkur ávís krøv, har tær standa. Eisini eru aðrar - sum til dømis tá endurskin komu í miðjuna á Eysturoyartunlinum. Tað var eisini eftir eina vanlukku í tunlinum, sum kostaði eitt mannalív.

### Null-hugsjónin

Ferðslutrygd samtykti álitið um Null-hugsjónina á ársfundi í fjør, og væntandi verður álitið lagt fram fyri løgtingið sum uppskot til samtyktar.

– Tá uppskotið er samtykt í tinginum, vóna vit, at ferðsluskaðanevndin fer at koma, sigur Jón Kragesteen, sum býtir gongdina upp í sløg. Fyrsta slagið var, at Ráðið fyri Ferðslutrygd samtykti uppskotið, síðani at fáa løgtingið at gera tað sama.

– Triðja stigið má so vera, at tað verður arbeitt strategiskt við, hvussu kunnu vit røkka Null-hugsjónini, og tað er nevniliga har, at ferðsluskaðanevndin kemur inn, sigur hann.

Um staðfestast skal, hvat er best at gera, mugu nøkur ting fáast á borðið um, hvat kann gerast fyri, at vit kunnu gerast klókari og hvat so framyvir, heldur Jón fram.

At enda sigur hann, at hann veit ikki, hvussu almenn ein frágreiðing frá eini ferðsluskaðanevnd skal vera.

– Sannleikin má og skal fram. Tað verður ikki lagt eftir fólki, men eg eri greiður yvir, at summir upplýsningar kunnu koma at svíða hjá summum. Men fyri at læra, so mugu upplýsingarnir koma fram, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

# Null-hugsjónin í vinnumálaráðnum

Sum er liggur álitið um Null-hugsjónina hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í vinnumálaráðnum, har arbeitt verður við at gera tað klárt til at leggja fyri á landsstýrisfundi. Og tað verður væntandi um mánaðarskiftið.

Síðani verður málið koyrt í løgtingsskrivstovuna, har løgtingsformaðurin ger av, nær tað verður lagt fyri tingið til viðgerðar.

Um alt gongur, sum væntað, so verður tað helst um hálvan mars mánað, vænta tey á Ferðslutrygd.

# Fakta

Danska ferðsluskaðanevndin, sum sá dagsins ljós í 2001, er ein nevnd, sum er mannað við tíggju fakfólkum av ymsum slagi umboðandi læknar, sálarfrøðingar, bileftirlit, løgregluna og Vegdirektoratið.

Endamálið við ferðsluskaðanevndini er, at hon skal við títtum millumbilum gera tvørfakligar kanningar av typum av ferðsluvanlukkum, sum koma ofta fyri í Danmark.

Endamálið við kanningunum er, at fáa eina betri og meira nágreiniliga mynd av vanlukkuumstøðunum og eina størri vitan um møgulig viðurskifti, sum kunnu liggja aftan fyri eina tílíka vanlukku, enn fáast kann við eini vanligari vanlukkukanning.

Arbeiðið hjá Havaríkommissióini hevur onki við arbeiðið hjá løgregluni ella bileftirlitinum at gera. Ei heldur tekur hon støðu til skuld.

Tá úrslit fyriliggja, tekur nevndin í tann mun tað ber til, niðurstøður fram, sum avvarðandi myndugleikar kunnu umhugsa í teirra ætlanum.

# Viðmæli frá nevndini

**Viðmæli frá donsku skaðanevndinieftir eina kanning av ferðsluvanlukkum á motorvegunum í Danmark**

Nevndin viðmælir at:

– Ígjøgnum upplýsingararbeiði, herferðir og øktum løgreglu luti skulu tey, ið ferðast í ferðsluni fáast í størri mun at yvirhalda púra vanligar reglar fyri koyring á motorvegunum.

– Upplýsingar, herferðir og útbúgving rættað móti teimum meira royndu bilførarum, sum hava eina skeiva uppfatan av, hvussu trygt hesir koyra og geva teimum eina betri fatan av, júst hvussu nógv ferðin hevur at siga

– Nógvir bilførarar mugu fáa eina økta vitan og skilja betur, hvussu ferðin hongur saman við sýni og steðgilongd

Hetta er sum sagt ein viðmæli frá ferðsluskaðanevndini í Danmark um, hvat kann gerast fyri at minka um vanlukku á motorvegunum í Danmark. Eftir at nevndin hevur kannað ferðsluvanlukkur á motorvegunum. Somuleiðis hava tey eisini boð um, hvat kann gerast fyri at minka um aðrar vandar út frá øðrum evnum, sum tey hava kannað.

*Kelda: www.hvu.dk*